**Bjørn á Heygum, adv.**
**Alfred Petersen, adv.**
Bøgøta 16
100 Tórshavn
e-mail: heygum@adv.fo

Postsmoga 164
110 Tórshavn
Telefon (298)351710
Telefax (298)351711

Eik Banki: konto nr. 9181-200.485.4
Bank Nordik: konto nr. 6460-152.941.4
Norðoya Sparikassi: konto nr. 9865-150.643.3
Suðuroyar Sparikassi: konto nr. 9870-101.115.5

Norðlýsið
Rygsvegur 3
FO-700 Klakksvík
Att. John William Joensen

Tórshavn tann 29.01. 2014

J.nr. 914015

**Viðv. responsum um spurningin hvørt brúkarin hevur skyldu til at endurrinda landskassanum í íløguna í ávikavist Vága- & Norðoyatunnilin.**

Undirritaði hevur samb. áheitan kannað spurningum nærru um Landskassin hevur rætt til at krevja íløgina í undirsjóartunlarnar endurgoldna, við støði í nýtslugjøldum, sum verða áløgd ferðsluna gjøgnum tunlarnar.

Løgfrøðiliga grundarlagið í samband við meting og støðutakan til henda spurning eru løgtingslógirnar nr. 6. frá 8. febr. 2000 um fast samband um Vestmannasund og nr. 33 frá 26. mars 2002 um fast samband um Leirvíksfjørð við seinni broytingum.

Í báðum lógum stendur, at landsstýrismanninum verður heimilað at seta pening í verkætlanirnar samb. játtan á fíggjarlógini.

Til Vágatunnulin kann Landið seta í mesta lagi 160,3 mio í verkætlanina, meðan henda upphædd til Norðoyatunnilin er ásett til 205 mio kr, jfr. § 2 í báðum lógum.

Tá kostnaðurin av tunnlunum er væl meira enn partapeningur og/ella ábyrgdarpeningurin frá Landinum, má restin av íløguni fíggjast við lántøku.

Tá talan er um sjálvstøðug partafeløg, sum byggja og reka tunlarnar, eru tað hesi sum standa fyri lántøkuni, sum fæst til vega við trygd í ognini t.v.s. tunlunum, uttan at Landið veðheldur fyri lánunum.

Inntøkugrundarlagið, sum skal tryggja fíggingina og afturrindanina av lánunum er eitt sonevnt nýtslugjald frá teimum, sum nýta vega- og tunnilsanleggið. Hetta nýtslugjald verður einvíst ásett av sjálvum felagnum, jfr. § 5 í lógini um tunnil um Vágatunnilin og § 3 í lógini um Norðoyatunnilin.

Í § 1 stk. 4 í lógini um Vágatunnilin og § 1. stk 3 í lógini um Norðoyatunnilin er ásett, at tá útveganarkostnaðurin er fult afturgoldin, verður alt anleggið uttan viðurlag avhendað landinum til ognar.

**Bjørn á Heygum, adv.**
**Alfred Petersen, adv.**
Bøgøta 16
100 Tórshavn
e-mail: heygum@adv.fo

Postsmoga 164
110 Tórshavn
Telefon (298)351710
Telefax (298)351711

Eik Banki: konto nr. 9181-200.485.4
Bank Nordik: konto nr. 6460-152.941.4
Norðoya Sparikassi: konto nr. 9865-150.643.3
Suðuroyar Sparikassi: konto nr. 9870-101.115.5

Spurningurin er nú um útveganarkostnaðurin meinast við samlaða kostnaðin ella bert fevnir um tann partin av kostnaðinum, sum er útvegaður við láni, uttan partapeningin/ábyrgdar-peningin frá landinum.

Í viðmerkingunum til lógina stendur bert, at tað almenna fær ognarrættin til samlaða anleggið, **tá íløgan er fult útgoldin.**

Her stendur bert **"íløgan"** og ikki nærri hvat meinast við íløgan, harundir um talan er um samlaðu nýtsluna av peningi íroknað partapeningin frá landinum, ella bert lánsfíggjaða partin av peninginum, sum er brúkt til íløguna.

Um her meinast við samlaðu íløguna, so skal tunnilin ikki latast landinum aftur fyrr enn alt er goldið, t.v.s. eisini tann partur, sum brúktur er til íløguna burtur av tí partapeningi, sum landið hevur sett í verkætlanina.

Sostatt skal Landið fáa endurrindað partapeningin áðrenn ognarrætturin til tunnilin verður latin tí almenna.

Um meinast við lánsfíggjaðu íløguna og ikki partapening/ábyrgdarpening frá Landinum, so verður tunnilin latin tí almenna aftur, tá sjálv lánini til íløguna eru afturgoldin.

Tá hesin spurningur ikki er nóg væl greiddur í nevndu reglu, er neyðugt at leita aðrastaðni í lógini og viðmerkingunum til lógina, fyri at koma fram til eina rætta tulking av hesi áseting í lógini.

Eyðsæð er, at nýtslugjøldini verða ásett til tess at fáa fremmanda fígging og gera tunnilsfelagið ført fyri at halda sínar skyldur og afturrinda lánini,

Spurningurin er nú um nýtslugjøldini eru ætlaði til annað og meira enn hetta, harundir at afturrinda Landinum útreiðslurnar til partapeningin/ábygdarpeningin?

Um fígging av verkætlanini sæst í generellu viðmerkingunum til lógina um Norðoyatunnilin, at fígging til verkætlanina umframt tær 225 mio kr. sum Landið setir í felagið, er upptøka av láni úr fíggingarstovnunum.

Staðfest verður, at onki landskassaveðhald kemur uppá tal, og at leiklutur landskassans í fíggingini av tunlinum er úti (t.v.s. avmarkaður) við játtanini av teimum samlaðu 225 mió kr. í partapeningi.

**Bjørn á Heygum, adv.**
**Alfred Petersen, adv.**
Bøgøta 16
100 Tórshavn
e-mail: heygum@adv.fo

Postsmoga 164
110 Tórshavn
Telefon (298)351710
Telefax (298)351711

Eik Banki: konto nr. 9181-200.485.4
Bank Nordik: konto nr. 6460-152.941.4
Norðoya Sparikassi: konto nr. 9865-150.643.3
Suðuroyar Sparikassi: konto nr. 9870-101.115.5

Undir fíggjarligum avleiðingum fyri landið er viðmerkt, at leiðsla felagsins um hetta mundi arbeiddi við eini íløguætlan uppá 330 mió kr., og er hetta uttan fíggjarkostnað, byggirentu og MVG. **Partur av hesi upphædd, skal tó fíggjast við bummpengainntøkum**, so landskassans partur verður tilsamans 225 mió kr.

Undir rakstrarútreiðslur stendur í viðmerkingunum, at felagið ber allan rakstrarkostnað av tunlinum, til hesin verður avhendaður landinum til ognar.

Undir viðmerkingunum til § 3 stendur, at ætlanin er, at **nýtslugjøldini skulu fíggja bæði afturgjaldingina av lánunum til bygginga og raksturin av vegunum og tunlinum.**

Onki stendur um at nýtslugjøldini skulu fíggja nakað annað!

Ætlan felagsins er, at **hesi nýtslugjøld skulu vera av eini støðd, sum ger, at felagið hevur ráð at afturgjalda rentur og avdráttir til lánistovnarnar, umframt at kunna gjalda rakstur og viðlíkahald av anlegginum. Eisini skulu nýtslugjøldini gera felagið ført fyri at konsolidera seg rímuliga væl.**

Seinni stendur soleiðis at tað um hetta mundi var ógjørligt at meta um hvussu stór nýtslugjøldini fóru at verða, tí **samlaði íløgukostnaðurin** fer at avgerða tað.

Tað er síðani ein sannroynd, at nýtslugjøldini ikki eru ásett í mun til samlaðu íløgukostnaðin, men í mun til loypandi kostnaðin av lánunum og rakstrinum.

Grundað á hesar fyritreytir er greitt, **at samlaði íløgukostnaðurin í viðmerkingunum er avmarkaður til lánsfíggjaða partin av íløgini.**

Út frá hesum kann síðan staðfestast, at ongin ætlan hevur verið - ella fyribils er - um at afturrinda Landinum kostnaðin av at seta partapening í felagið.

Tá tað somuleiðis er tilskilað í viðmerkingunum, og henda orðing er nýtt nevniliga: "**At partur av hesi upphædd, skal tó fíggjast við bummpengainntøkum**", so landskassans partur verður tilsamans 225 mió kr, so er tað bert hesin **partur,** sum skal fíggjast við bummpengum - og ikki landskassans partur!

Við øðrum orðum, so er **útveganarkostnaðurin** í § 1 stk. 3 at javnmeta við **lánsfíggjaða íløguna**, og tá henda er afturgoldin, skal alt anleggið uttan viðurlag avhendast Landinum til ognar.

**Bjørn á Heygum, adv.**
**Alfred Petersen, adv.**
Bøgøta 16
100 Tórshavn
e-mail: heygum@adv.fo

Postsmoga 164
110 Tórshavn
Telefon (298)351710
Telefax (298)351711

| | |
|---|---|
| Eik Banki: | konto nr. 9181-200.485.4 |
| Bank Nordik: | konto nr. 6460-152.941.4 |
| Norðoya Sparikassi: | konto nr. 9865-150.643.3 |
| Suðuroyar Sparikassi: | konto nr. 9870-101.115.5 |


At enda skal viðmerkjast, at tað vildi eisini verið tað sama sum at gjørt mismun á landsins borgarum, um lokala ferðslan í Norðoyggjum og í Vágum skuldi fíggja landskassans part, sum frammanundan er innkravdur skattapeningur frá øllum landsins borgarum, har landskassin alla aðra staðni við sínum íløgum í landsvegir, brýr og tunlar, onki serstakt nýtslugjald hevur kravt.

Viðv. fíggjarligu støðuni eftir yvirtøkuna, so stendur í viðmerkingunum, at felagið ber rakstrarkostnaðin av tunlinum til hesin verður avhendaður landinum til ognar. Landskassin yvirtekur tá rakstrarútreiðslurnar av tunlinum, sum um hetta mundi vóru mettar til 5 – 6 mió kr. árliga.

Landið kemur hervið at bera allar rakstar- og viðlíkaghaldsútreiðslur av hesum tunlum á sama hátt, sum av øðrum tunlum, so sum Hovstunlinum, Norðskálatunlinum v.m. uttan at serstakt nýtslugjald kann innkrevjast í hesum sambandi.

Bjørn á Heygum, adv.